# Missa leiðsluna

Hóast tað var í seinna hálvleiki, at NSÍ royndi at trýsta EB/Streym, so helt Christian Høgni Jacobsen eftir dystin, at teir skuldu vera betri nøgdir um fyrru trý korterini.

- Eg haldi, at har var ov lítið spæl hjá okkum eftir steðgin. Tað er nakað av vindi, og tá tú so spælir við longum bóltum niðaneftir, verður tað ofta trupult at fáa nakað burturúr.

*Men at tit hava so stóra yvirvág, uttan verulga at skapa møguleikar, ber tað ikki boð um trupulleikar í spælinum?*

- Tað kanst tú kanska siga. Vit eru í øllum førum ikki nóg dugnaligir til at finna álopsspælararnar. Tað var kanska størsti trupulleikin hesaferð, og tann trupulleikan hava vit eisini havt fyrr.

Um spælið í dystinum helt Christian Høgni annars, at hann og liðfelagarnir enn einaferð høvdu sveiggjað ov nógv ígjøgnum dystin. Men hann legði samstundis dent á, at hetta er nakað, sum teir kunnu arbeiða seg burturúr.

- Tað er kanska tað, at vit eru nakað bangnir fyri at vinna. Fáa vit nakrar sigrar, so fer tað helst at verða betri. Í dag eru vit til dømis framman fyri tvær ferðir, og tá skalt tú helst vinna ein dyst. Men hinvegin, so høvdu teir eisini sínar kjansir, so javnleikurin var kanska á leið.

-jm

EB/Streymur-NSÍ 2-2 (1-2):

# Samdust á Mølini



**NSÍ átti trýstið, men bestu møguleikarnir fullur tó til vertirnir, tá EB/Streymur sunnudagin tók ímóti NSÍ**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast talan var um tvey lið sum heldur enn fegin vildu hava stigini, sum spælt varð um, so máttu bæði EB/-Streymur og NSÍ taka til takkar við javnleikinum sunnudagin. Ein javnleikur, sum kanska ikki er nøkur vanlukka, men sum hinvegin heldur ikki lyfti liðini nakað serligt á talvuni.

### Royndu at spæla

Vertirnir hava fyrstu umførini fingið fleiri atfinningar fyri, at teir ikki hava spælt nóg væl fótbólt, men heldur hava valt at standa í verjustøðu og sparka langt.

Kann vera, at partur av hesum atfinningum ikki hava verið heilt rímiligar, og í øllum førum tóktist tað, sum vildi liðið afturvísa hesum uppáhaldinum. Frá fyrsta bríksli varð roynt at halda bóltin á jørðini, og heldur geva sær tol og stundir at pilka mótstøðuverjuna.

Og størsta partin av fyrra hálvleiki eydnaðist hetta eisini sera væl. Eisini hóast tað mundi koma sum vátur vøttur, tá gestirnir brádliga løgdu seg á odda.

Hjá NSÍ var greitt, at liðið kanska var skert í meira lagi. Í øllum førum gav tað trupulleikar á bakkinum, at Sjúrður Jacobsen ikki var klárur eftir skaða, og fleiri ferðir skaptu vertirnir vandastøður við kvikum uppspæli í síðunum. Tað var eisini eftir eitt slíkt, at útjavnandi málið kom. Bárður fekk bóltin eftir langt skift, og tá hann ikki fekk skotið sjálvur, trillaði hann aftur til Hans Paula Petersen, sum hølvaði bóltin inn.

### Trupulleikar við at bíða

Málið var kanska ein ábending um, at NSÍ ikki eru nóg sterkir til at fara í bólthavaran, tá teir eru í verjustøðu. Fleiri ferðir bakkaðu teir heilt langt undan skotsterku og –glaðu gestunum, og tað mundi eisini kostað ta einum ferðina. Ivaleyst vilja tey hjá heimaliðnum vera við, at bólturin var innan fyri strikuna, tá Pacek smekkaði upp undir tvørtræið, men floytan segði einki, og so sluppu runavíkingarnir við skrekkinum.

Tað slapp EB/Streymur eisini, tá Christian Høgni Jacobsen var um at verða fyrstur á innleggi úr vinstru, men tann bólturin sneiddi sær beint framvið málinum. Tað gjørdi hann so ikki, tá vertirnir beint undan steðginum fingu sær enn ein blund, soleiðis at NSÍ kundi skora eftir deyðbóltsstøðu. Nakað sum annars tykist eyðkenna øll tey lið, sum Trygvi Mortensen hevur fingist við seinnu árini.

### NSÍ trýsti uttan vekt

Eftir steðgin skifti dysturin fullkomuliga ham. Nakað av vindi hevði verið eftir vøllinum, tó at heta ikki darvaði spælinum nakað serligt, men runavíkingar høvdu so lítla lotið í ryggin eftir steðgin.

Um tað var hetta, sum gjørdi munin, skal vera ósagt, men tað vóru gestirnir, sum sótu á snøgt sagt øllum. Teir royndu støðugt at trýsta spælið oman móti EB/Streyma málinum, og tó at talan sera sjáldan gjørdist um veruligar møguleikar. Hinvegin var heimaliðið kanska tað vandamiklara, og tað eydnaðist eisini at javna eftir kanska besta álopið í dystinum.

Og so stóð NSÍ fyri tí nógva næsta hálva tíman ella har á leið. Við einum ótroyttiligum Helga L. Petersen sum drívmegin á miðvøllinum, varð at kalla hvør tann einasti nærdysturin vunnin, og hjá EB/-Streymi fekk verjan ikki gjørt nógv annað enn at sparka burtur. Snøgt sagt tí

## Málini

**0-1: Ikechukwu Onyema, 10.**
Eingin vandi tykist vera á ferð, tá NSÍ sendir bóltin inn í brotsteigin, men tá Pacek ikki fær beint bóltin burtur, stendur Ike brádliga púra blankur og kann pota bóltin í netið.

**1-1: Hans Pauli Samuelsen, 17.**
Millum mongu perlurnar, sum Hans Pauli hevur sent í kassan, man hendan avgjørt teljast millum tær bestu. Bárður Olsen leggur út frá til Hans Paula, sum meddar bóltin beint í málhornið. Jens Martin fekk kanska blunkað eina ferð við eygunum, men so heldur ikki meira.

**1-2: Christian Høgni Jacobsen, 45**
Vertirnir snorksova, tá NSÍ fær fríspark, og so gongur tað skjótt fyri seg. Christian Høgni fær bóltin stungnan innum verjuna, og tó at Gunnar fær hondina á bóltin, so fær hann ikki forðað fyri málinum.

**2-2: Gert Hansen, 52.**
Uppspælið er eftir bókini, tá Hans Pauli fyrst vinnur bóltin, fyri síðani at renna seg leysan í síðuni. Innleggið er neyvt, og so kann Gert í fullari ferð stúta bóltin niður í málhornið.

## FAKTA UM DYSTIN

**EB/Streymur - NSÍ 2-2 (1-2)**
0-1: Ikechukwu Onyema, 9.
1-1: Hans Pauli Samuelsen, 18.
1-2: Christian Høgni Jacobsen, 44.
2-2: Gert Hansen, 52
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig - Ólavur Poulsen, Andrzej Pacek, Egil á Bø, Jóhann á Stongum - Bárður Olsen, Gert Hansen, Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen - Sonni L. Petersen (Leif Niclasen, 77.), Sorin Anghel.
**GK:** Hans Pauli Samuelsen, 76.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Dánial Hansen, Einar Hansen (Jónstein Petersen, 61.) - Gert Langgaard, Helgi L. Petersen, Jústinus R. Hansen, Andy Olsen (Debus Danielsen, 77.) - Ikechukwu Onyema, Christian Høgni Jacobsen
**GK:** Einar Hansen, 15., Jústines R. Hansen, 58.
**Dómari:** Oddmar Andreasen. Kom sera væl frá uppgávuni. Meint positivt, so legði tú nærum ikki til merkis, at nakar dómari var á vøllinum